Fíggjarmálaráðið

Lønardeildin

# Avtala um arbeiði umborð á rannsóknarskipinum, Jákup Sverri

Tá starvsfólk á Havstovuni, ella frá øðrum almennum stovnum, eru við rannsóknarskipi, fáa tey (tó ikki stovnsleiðarin) hesa samsýning/siglipening:

1. Fyri hvønn dag umborð verður goldin siglipeningur svarandi til 4 % av lønini í 26. lønarflokki á 1. stigi eftir lønartalvuni hjá tænastumonnum landsins. Dagarnir umborð eru at rokna teir dagar, tá skipið hevur loyst frá kai. Siglipeningurin er samsýning umframt ta vanligu lønina, sum starvsfólkini fáa sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelagið.

2. Fyri at vera við fremmandum skipi (t.e. ikki rannsóknarskipi), verður fyri hvønn dag umborð goldin siglipeningur svarandi til 4,5 % av lønini í 26. lønarflokki á stigi 1 eftir lønartalvuni hjá tænastumonnum landsins. Dagarnir umborð eru at rokna teir dagar, tá skipið hevur loyst frá kai. Siglipeningurin er samsýning umframt ta vanligu lønina, sum starvsfólkini fáa sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelagið.

3. Fyri hvønn leygardag og fyri hvønn sunnudag umborð verður veittur ein dagur frí í landi. Umframt siglipening ásettur í pkt. 1, verður siglipeningur svarandi til hálvan dag latin fyri hvønn dag í vikuskiftinum.

4. Fyri skeivar halgidagar fáa starvsfólk sama yvirtíðargjald sum dekkarar á rannsóknarskipinum, tá tey eru við hesar dagar. Dagarnir umborð eru at rokna teir dagar, tá skipið hevur loyst frá kai.

5. Siglipeningurin til toktleiðaran er 1 % hægri enn siglipeningurin ásettur í pkt. 1 og 2.

6. Tá starvsfólk vegna arbeiði umborð á Jákup Sverra ella øðrum rannsóknarskipi vinna sær eina tímasalda, ið fer upp um 40 plusstímar, eigur avtala at gerast um, hvussu tímarnir oman fyri 40 tímar verða avroknaðir. Hetta annaðhvørt sum avspáking ella útgjald.

8. Hendan avtalan er galdandi frá tí degi semja verður undirskrivað.

Tinganes 24. november 2023

______________________________ ______________________________

Ruth Vang, Landsstýriskvinna í Fíggjarmálum

Páll Nolsøe, formaður í AKF

______________________________

Jan Mortensen, Lønarstjóri